## Vísa seg í USA

Kommunan og vinnulívið í Tromsø hava gjørt av at taka lut á einari stórari framsýning, sum verður í Houston í USA 28. apríl. Talan er um eina frálandaframsýning, og ætlanin hjá norsku fyritøkunum er at gera vart við seg, og hvat tær kunnu bjóða á økinum. Nógv av teimum stóru oljufeløgunum og stórar altjóða frálandafyritøkur luttaka á framsýningini í Houston. Tað er eisini sera dýrt, og tí verður norski básurin bara seks fermetrar.

## Eingin Listeria

Norska matvørueftirlitið hevur kannað, hvussu tað er við Listeria-bakterium í royktum laksi, sum verður seldur í handlunum, og niðurstøðan er, at hesar bakteriurnar eru ikki í roykta laksinum. Magne Yndestad, sum hevur staðið fyri kanningini, sigur við Sunnmørsposten, at Listeria-bakteriur trívast ikki so væl í royktum laksi, sum norsku granskararnir høvdu hildið. Men tey, sum keypa royktan laks í handlinum, eiga at goyma hann í kuldaskápi.

# la við Skála Skipasmiðju

gjørd um útlendsku arbeiðsmegina.

Hann nýtti eisini høvi at takka øllum teimum, sum leggja rygg til á Skála Skipasmiðju fyri, at hetta – og annað virksemi, sum skipasmiðjan hevur – er lív lagað.

– Arbeiðsplássini og fólkini, sum mynda arbeiðsplássið, eru eitt. Uttan virki, er einki starvsfólk – og uttan starvsfólk er einki virki. Neyðugt er, at vit øll draga eina línu, legði hann dent á.

Gunnar Mohr nýtti eisini høvi at siga, at umframt byggivirksemi á Skála, hevur skipasmiðjan eisini umvælingararbeiði av ymiskum slagi, sum neyðugt er at halda fast um.

– Úti á FJM er eisini virksemi av ymiskum slagi, eitt nú eru teir í holt við verksmiðjurnar til nýggju trolararnar, sum Faroe Seafood letur byggja í Spaniu, og eisini eru teir í holt við eina verksmiðju til hummarafiskiskap, sum ein bátur í Skotlandi skal hava, segði stjórin.

### Alt undirskrivað

Tá ið røður vóru hildnar, og folk høvdu fingið sær gott kaffi, te, rundstykki og fløtakaku, vórðu tey formellu viðurskiftini avgreidd við undirskriving av sáttmálum.

Eftir at sjálvur byggisáttmálin var undirskrivaður, varð nýggjur sáttmáli eisini undirskrivaður millum stjóran í pólsku skipasmiðjuni, sum leigar Skála Skipasmiðju arbeiðsmenninar.

Eftir hetta vórðu sáttmálar undirskrivaðir millum Skála Skipasmiðju og fleiri undirveitarar.

Fyrstir í røðini var El-Service, í øðrum lagi Byggiservice, í triðja lagi Demich og í fjórða lagi Radiobúðin.

Dánjal Aldreassen, fyrisitingarleiðari, segði við Sosialin eftir formella tíðindafundin, at tað aftur hesaferð verða póllending-



*Faðir og sonur, 81 ára gamli Magnus Joensen undir liðini á Gunnbjørn Joensen, stjóra í Thor*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Sáttmáli verður undirskrivaður við stjóran á pólsku skipasmiðjuni, haðani Skála Skipasmiðja leigar útlendsku arbeiðsmegina*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*John Eli Joensen undirskrivar fyri El-Service*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ar, sum koma at smíða henda nýbygningin.

– Tað er soleiðis, at póllendingarnir kunnu arbeiða í Føroyum í eitt hálvt ár í senn, og síðan kemur nýtt folk til landið.

Fyrisitingarleiðarin sigur, at við nýggja skipinum, sum farið verður undir í næstum, verður samlaða talið av póllendingum ikki fleiri enn í dag.

– Vit koma at hava sama tal av útlendingum, sum vit hava havt, síðan farið varð undir nýbygning nr. 56, leggður Dánjal Andreassen aftrat.

Kostnaðurin fyri nýbygningin, sum nú er undirskrivaður, er 79 mijónir krónur.

### Skriva søgu

Tað eru neyvan fleiri meiningar um, at brøðurnir, Gunnbjørn og Hans Andrias Joensen, hava neglt sítt navn í sjóvinnusøgu føroyinga – ikki minst seinastu árini, nú felagið í Hósvík hevur gjørt veldugar íløgur, bæði í frálandaog fiskivinnu.

Hjá teimum báðum ræður hugflog at síggja møguleikar – og eisini møguleikar, ið aðrir ikki síggja í sama mun.

Fyritøkan í Hósvík hevur vaksið ógvuliga nógv um sítt virksemi í seinastuni, og nú bíða vit bara eftir, hvat næsta stigið hjá hesum báðum dugnaligu framtaksmonnunum verður.

## Annfinn vil ikki vera formaður

Annfinn Brekkstein ber seg undan afturvali til Formann í Føroya Væl, skrivar Dimmalætting í dag.

Annfinn Brekkstein er afturvaldur í nevndina á veljarafelagnum í Suðurstreymoy hjá Sambandsflokkinum. Men hann ber seg undan at fara í formanssessin, ið hann hevur sitið í fleiri tey seinastu árini. Annfin Brekkstein sigur orsøkina vera, at hann ætlar sær at stilla upp til komandi val, og hetta kann seta hann í eina tvístøðu, sum hann ikki hevur hug at koma í aftur. Hann upplivdi hetta í 2004, tá hann stillaði upp til Býráðsvalið í Tórshavnar kommunu.

Dimmalætting skrivar, at hetta eru aðru ferð, at Annfinn Brekkstein ber seg undan afturvali til formann. Hetta var eisini støðan undan seinasta formansvali, men tá var hann afturvaldur álíkavæl. Annfinn Brekkstein sigur við blaðið, at hann vónar, at hetta ikki endurtekur seg hesaferð.

**nud**